Ítrótta FAGNAÐUR

# ÍtróttaSÓLSTRÁLAN

***UPPSKOT:***

Ársins ÍtróttaSÓLSTRÁLA er ein ungur persónur - 20 ár ella yngri - ið við sínum góða lið- og felagsanda ger sítt íkast til, at hini á liðnum ella í felagnum kenna seg vælkomin, sædd og sum ein umráðandi part av liðnum/felagnum. Sostatt leggur SÓLSTRÁLAN lunnar undir tann góða felagsskapin.

SÓLSTRÁLAN stimbrar undir rørslu- og ítróttargleðina hjá hinum og lyftir tey, bæði tá gongur við og tá tað gongur ímóti. Hon lýsir upp, tá ið lagið er ringt, tá ið venjingin er hørð, og tá ið úrslitini ikki eru sum ætlað.

Ársins SÓLSTRÁLAroynir at fáa øll við - bæði til venjingar og kappingar, men eisini í sosiala lívinum uttanfyri ítróttin. Har íðkarar fungera væl sosialt, halda tey ungu fram í ítróttinum í longri tíð. Tískil vigar týdningurin, sum SÓLSTRÁLAN hevur fyri samanhaldið, eisini tungt í samlaðu metingini.

**Í grundgevingunum kunnu tit greiða frá, hvussu viðkomandi, sum tit skjóta upp, eitt nú:**

- Á serligan hátt styrkir og stimbrar samanhaldið í felagnum
- Skapar gott vinarlag á liðnum ella í felagnum
- Er ein góð fyrimynd
- Hevur jaligan hugburð og góða orku
- Fær øll at kenna seg vælkomin
- Skapar gott lag - eisini tá ið tað gongst illa

***Arbeiðsgongd:***

- Øll kunnu innstilla eina ÍtróttaSÓLSTRÁLU (20 ár ella yngri), sum viðkomandi metir hevur virkað fyri at fremja lið- og felagsandan á serstakan hátt í undanfarna árið
- Ungdóms- og Menningarnevndin tekur støðu til, hvørji skulu innstillast sum ársins ÍtróttaSÓLSTRÁLU.
- Øll kunnu atkvøða á talgildu miðlunum, meðan tiltakið er.
- Ein persónur verður kosin ÍtróttaSÓLSTRÁLA hvørt ár. Nevndin kann taka avgerð um, at eingin verður tilnevndur.

**Innstillingar verða sendar inn við eini leinkju, sum verður send út við telduposti,<br>ella løgd á heimasíðuna og SoMe**